Sørvágs kommuna

# Kunningarskriv 2011









www.sorvag.fo

Sørvágs Kommuna
FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

# Kunningarskriv 2011

**Góðu borgarar**

Hetta er so triðja kunningarskriv hjá sitandi bygdaráð, og hyggja vit eftir, hvat kommunuskattakrónurnar eru brúktar til, so hevur undirvísing, mentan og frítíð staðið í miðdeplinum hesi árini.

**Fíggjarætlanin 2011**

Samsvarandi fíggjarætlanini fyri 2011 var ætlanin at gera íløgur fyri 8,6 mió. kr. í 2011. Høvuðsíløgurnar vóru hesar:

| | |
|---|---|
| Skúlin | 4.080.000 |
| Sandur | 1.124.125 |
| Alvalon | 400.000 |
| Ítróttaranlegg | 100.000 |
| Lønarskipan | 102.000 |
| Keyp av lendi | 278.502 |
| Fríðkan og grótlaðing | 1.000.000 |
| Byggibúning | 855.373 |
| Vatn | 300.000 |
| Vegir | 750.000 |
| Havnin | 200.000 |
| Ídnaðarøkið | -600.000 |





**Skúlin**
Hyggja vit eftir kommunum á somu støðd sum okkara og størri, so eru íløgur í skúlan ein tungur fíggjarligur postur. Skúlar, um sama aldur sum okkara, eru í Runavík, Toftum og á Strondum. Allir eru teir um- og útbygdir, og kostnaðurin av hesum hevur tyngt kommunurnar fíggjarliga í langa tíð. Grannakommunan stendur eisini fyri stórum avbjóðingum, eins og vit sjálvi gera tað. Í farna ári eru góðar 4 mió. brúktar upp á tann elsta partin av skúlanum hjá okkum.
Gamla fimleikahøllin og gomlu skúlabygningarnir hava fingið nýggja tekju, samstundis sum lendið oman fyri bygningarnar er drenað, bjálvað og vætutryggjað. Lyftur og rampa eru settar upp, so lættari er hjá fólki at koma runt í bygningunum.

**Sørvágs Kommuna**
FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo




**Sandurin**

Sum fráboðað í seinasta kunningarskrivi hevur Sørvágs kommuna í samstarvi við Jarðfeingi arbeitt við einari verkætlan, har ætlanin var at fáa sjóhitan úr sandinum.
Fyri at tryggja okkum sum frægast, vóru umboð fyri Reno-Vent fyritøkuna saman við borgarstjóranum í Tróndheimi í Norra og hugdu eftir líknandi skipan. Umstøðurnar, t.v.s. sandurin og lendið rundan um líktist okkara, men teirra skipan var 20.000 m. av slangu í mun til okkara 5.000 m.
Høvuðsmóttakarin av orku hjá teimun var ein skoytuhøll og eitt gistingarhús, sum var bygt niðri við sjóvarmálan.
Teir, sum høvdu við skipanina at gera, lótu væl at, so heimafturkomin varð støða tikin endaliga í bygdaráðnum at fara undir verkætlanina.
Arbeiðið gekk eftir ætlan, men enn er nakað tíðliga at siga, hvussu nógv verður spart.
Avtala varð gjørd við Jarðfeingi um mátitól, sum tó ikki eru monteraði enn, men vit hava okkara egnu mátingar, sum geva okkum eina góða ábending. Av tí at skúlin hevur hagtøl yvir oljunýtslu fleiri ár aftur í tíðina, ber til at samanbera, hvat vit brúka í streymi í mun til olju fyrr.
Og vit kunnu siga so mikið fyribils, at skipanin sær út til at loysa seg.



**Fríðkan í kommununi**

Størsti parturin av játtanini fór aftur í ár til grótlaðing. Vegamótið millum Ovara- og Niðaraveg er gjørt liðugt, samstundis sum rimaverk er sett á gøtuna niðan fyri Kedron. Ætlanin er so, at økið skal vera lagt við steini. Moldskráarnir í havunum á Niðaravegi eru hampaðir, samstundis sum trappurnar við busskýlið á Niðaraveg eru lidnar. Vegamóti millum Rossatrøðna og Bakkavegin er komið væl áleiðis, og gongur sum ætlað, so er grótlaðingin á Niðara- og Ovaraveg liðug í komandi ári.
Nakað av grótlaðing hevur eisini verið í Bø. Túnið í miðbygdini er hampað, samstundis sum vendiplássið og nakað av grótgarði er laðað á Tungu.
Nakað av trøum er eisini gróðursett í farna ári.

**Sørvágs Kommuna**
FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

**Vatnveitingar, havnir og lendingar**
Í august mánaða trýsti Jegvan Heinesen á knøttin í reinsiverkinum í Bø.
Vit eru ikki heilt nøgdir við skipanina enn. Í skurðtíðini verður nógv meira vatn brúkt enn vanligt er í mun til fólkatalið, tí so nógv verður slátrað. Tí er ætlanin komandi vár at gera ta broyting, at brunnurin, sum goymir rávatnið, og letur tað oman í reinsiverkið, skal verða goymsla fyri reinsað vatn. Henda broytina skuldi havt við sær, at nokk av reinsaðum vatni var, og at trýstið í ovastu húsunum á Tunga verður nøktandi. Tað skal tó viðmerkjast, at góðskan á vatninum er í lagi.

Í samband við at Luna fer at flyta tøkubúrið heim á bryggjukantin fyri at kryvja laksin, sum gongur á Sørvágsfirið um ársskiftið, kravdi Heilsufrøðiliga Starvstovan, at allar kloakkir á bryggjuni vórðu savnaðar saman, so bert eitt rør, ella sum teir siga, eitt útlát verður.
Hetta arbeiði er komið væl áleiðis, og tá uppfyllir bryggjan tey krøv, sum sett eru til kloakkskipan í 2015.
Í Gjónni í Mykinesi hevur verið sprongt í summar, so stóru klettarnir, sum ligið hava á botninum, skuldu nú ikki nerva siglingina.
Ódnin í síðsta mánaða fór illa við pullartunum á bryggjujuni. Tað var óheppið á hávetri, tá mest brúk er fyri henni, men veður og vindur má sær ráða. Vit hava gjørt avtalu við J&K Petersen um arbeiðið, og farið verður undir at seta pullartarnar upp, so skjótt, sum teir eru komnir til landið.



**Flogvøllurin.**
Fyri fáum døgum síðani var hátíðarhald á flogvøllinum í samband við, at longdi vøllurin varð tikin í nýtslu.
Sambært teimum, sum hildu talu, so skuldi økingin í longd upp á sløk 50% skapt heilt aðrar møguleikar, bæði hvat flogførum og flúgving upp á fjarskotin lond viðvíkur.
Hvørja ávirkan leingingin fer at hava, vita vit ikki í skrivandi løtu. Tá møguleikarnir batna hjá okkum, so batna møguleikarnir eisini hjá øðrum. Tað, at Atlantic hevur havt síni flogfør í Føroyum, og at eftirlit og viðlíkahald er gjørt í hangarinum í Vágum, hevur skapt nógv trygg, fjølltáttaði og vællønt arbeiðspláss. Í okkara døgum er kapping tað orðið, sum verður tanlað í tíð og ótíð.
Men kapping í okkara lítla samfelag kann í ringasta føri verða eitt tvíeggja svør.

**Samanumtikið**
Skulu vit taka saman um árið 2011, hvat inntøkum viðvíkur, so hevur fyribilsskattur í A-inntøkum fyrstu 11 mánaðarnar í 2011 verið 29.039.410 kr. í mun til 28.029.074 kr. fyrstu 11 mánaðarnar í 2010. Hetta er ein vøkstur upp á 1.010.336 kr, sum í prosentum svarar til 3,6 %.
Fyri árið 2011 metti bygdaráðið inntøkurnar at fara at verða:

| | |
|---|---|
| Kommunuskattur: | 28.700.000 kr. |
| Felagsskattur: | 600.000 kr. |
| Skattur av eftirløn: | 120.000 kr. |

Fyribilstølini fyri árið 2011 síggja soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Kommunuskattur: | 29.039.410 kr. |
| Felagsskattur: | 1.193.000 kr. |
| Skattur av eftirløn | 476.065 kr. |

Felagsskattur og skattur av eftirløn eru mettar av Toll og Skatt fyri 12 mánaðar, meðan kommunuskatturin er fyri 11 mánaðar.
Sum lesarin sær, so hava vit kanska verið í so varnir við inntøkunumetingunum fyri 2011, men tað er ongantíð ein trupuleiki at inntøkan er størri enn mett heldur tvørturímóti.

**Fíggjarætlanin 2012**
Fyri at fíggja rakstur og íløgur hevur kommunan eina fíggjarætlan, sum verður samtykt fyri fyrsta november á hvørjum ári. Bygdaráðið samtykti við 2. viðgerð fíggjarætlanin fyri 2012 á regluligum fundi fyrsta vetrardag 23. november 2011.

Høvuðstølini í fíggjarætlanini eru

| | |
|---|---|
| Rakstrarútreiðslur: | 27.118.000 kr. |
| Avdráttur: | 1.143.000 kr. |
| Samlaðar íløgur: | 11.519.000 kr. |
| | |
| Samlaðu inntøkur eru: | 31.380.000 kr. |
| Lán: | 8.400.000 kr. |
| | |
| Fíggjarætlanin javnvigar við: | 39.780.000 kr. |
| Rakstrarútreiðslur + íløgur: | 39.780.000 kr. |
| Inntøkur + lán: | 39.780.000 kr. |

Fyri at fíggja ætlaðu útreiðslunar er neyðugt at lána 8.4 mió. kr. Barnafrádrátturin verður óbroyttur 4.000 kr. fyri hvørt barnið, og skattaprosentið verður óbroytt 21,0 % fyri skattaárið 2012. Sum áður nevnt átaka vit okkum skuld, tí útbyggingar verða raðfestar hægri, enn raksturin loyvir.

Okkara skattaprosent liggur framhaldandi undir tí, sum flestu miðalstóru kommunur hava, og væl lægri enn tað, sum okkara nærmastu grannar hava.

**Fíggjarstøðan**
Við árslok er langfreistaða nettoskuldin hjá kommununi 13.700.000 kr. Vit hava goldið *842.300* kr. í 2011 í avdrátti. Vit hava fingið tilsøgn um at lána 8,4 mió. kr. frá peningastovni til lutvísa fígging av íløgum í komandi ári, og hendir einki óvæntað so verður nettoskuldin við árslok komandi ár góðar *21* mió.
Eg nevndi í síðsta kunningarskrivi, at tosið um kommunusamanlegging hevur gjørt meira skaða enn gagn. Í skrivandi løtu vita vit ikki, hvat fer at henda á kommunala økinum. Men skal nakað henda, so má tað henda skjótt, tí longu í november 2012 er kommunuval, og hevur løgtingið einki gjørt fyri tann dag, so kann tað bygdaráðið, sum tá verður valt, sita í friði og náðum tey næstu fýra árini og leggja saman, um tað er tað tey vilja, ella verða ein sjálvstøðug kommuna, um tað er tað tey vilja.
Fyri at taka afturíaftur eitt nógv tanlað mál um kommunuskuld, so hevur reglan heldur enn undantakið verið tann, at kommunurnar hava lánt seg upp á eina álíkning, áðrenn spurningurin um kommunusamanlegging hevur verið tikin upp í álvara.

FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

Fyri okkara viðkomandi er støðan tann, at ein álíkning við 23% , sum er prosentið fyri kommunuskuld, gevur eina skattainntøku upp á 34.200.000 kr. Vit skylda, sum áður nevnt, 21 mió. við árslok 2012. Tað vil siga at til ber at lánifíggja íløgur upp á 34.200.000 – 21.000.000 = 13 mió. uttan at spyrja Fíggjarmálaráðið um loyvi.
Tað ber eisini til at hækka kommunuskattaprosentið frá 21 til 23, so inntøkan hækkar við 3 mió. kr. árliga. Hetta verður nevnt fyri at vísa, at møguleikar fyri at útbyggja kommununa eru góðir, um einki óvanligt hendir, eisini í komandi valskeiði, bæði um skattaprosentið verður broytt ella um tað verður óbroytt.

**Íløguætlan í 2012**

| | |
|---|---|
| Alvalon: | 250.000 |
| Skúlin: | 5.730.000 |
| 07 Vestur: | 2.400.000 |
| Fríðkan: | 606.000 |
| Vatn: | 150.000 |
| Kloakk: | 153.000 |
| Vegir: | 1.930.000 |
| Sørvágs havn: | 300.000 |

**Alvalon**
Í ár er loftið í Alvalon gjørt meira alment og atkomuligt. Trappa er gjørd millum loft og miðhædd, eins og balkong bindur loftsrúmini saman. Upphæddin í ár verður brúkt til nýggjan køk og aðrar broytingar inni í bygninginum.



**Skúlin**
Næsta stigið at dagføra skúlan verður gjørt komandi ár. Tá er ætlanin at gera eina forstovu ella dur millum svimjihøllina og gomlu fimleikahøllina, so høvuðsinngongdin í nærmastu framtíð verður flutt. Møguleikarnir at koma til og frá skúlanum skuldu eisini verið betri har, sum parkeringsplássið til svimjihøllina nú er.
Vindeygu og hurðar verða útskift, eins og útveggirnir á gomlu bygningunum verða bjálvaðir og klæddir við timbri, ventilatión og el-útbúnaður verður innlagdur av nýggjum.
Sum tað sæst á skitsuni, verða vindeyguni í gomlu fimleikahøllini skorin niður, og partar av høllini fara í framtíðini at hýsa bókasavninum.

FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo



**07 Vestur**
Felagið hevur søkt kommununa um fíggjarligan stuðul til felagshús, sum ætlandi skal byggjast á Dungasandi.
Kostnaðarmetingin av húsinum er kr. 3.720.000, og bygdaráðið hevur einmælt samtykt at stuðla verkætlanina við 60% av kostnaðinum við ávísum treytum.
Onkur heldur helst at bygdaráðið hevur verið í so rummiskt at lata so stóran part av íløgunum, men vit eru samførd um at felagið megnar ikki við tí fólkagrundarlagi, sum er her í Vágum og Norðsteymoy við limagjøldum, sponsorum og tiltøkum at fíggja rakstur av felagnum, sum liggur um 2. mió. kr. árliga, umframt at fíggja felagshús fyri slakar 4 mió. kr.
Felagið miðar eftir at víðka um ungdómsarbeiðið, eins og stílað verður móti uppflyting aftur í Vodafondeildini.



**Skjalasavnið**
Í 2006 setti bygdaráðið seg í samband við Sonna Jacobsen um at kanna gomlu skjølini hjá kommununi. Arbeiðið var tvíbýtt, annað var at skilja og velja tey skjøl burtur úr, sum vóru hildin áhugaverd nokk at goyma fyri eftirtíðina á Landsskjalasavninum. Hitt var at finna og skráseta áhugaverdar upplýsingar úr skjølum.
Gamla skjalasavnið varð goymt á loftinum á skúlanum, og tá tað varð tikið fram aftur, vísti tað seg, at tað lá ein rúgva av flytieskjum, sum fyltu tvey full less í lastbilinum hjá kommununi.

**Skanning í turrum tølum**
Gerðabøkur og journalir hjá Vága Sóknar kommunu 1631 síður.
Gerðabøkur og journalir hjá Sørvágs kommunu 4469 síður. Brøv hjá Sørvágs kommunu ca. 1915 – 1990 28.643 síður.
Úr gerðabókum, roknskaparbókum og úr brøvum frá tíðini 1855 – ca.. 1990 er tað mest áhugaverda skrivað inn á teldu og prentað út.
Tilfarið, sum er prentað og latið Sørvágs kommunu fyllir 7 ringbind við 2631 tættskrivaðum A4 síðum.
Á myndini síggjast ringbindini og fløgurnar við skannaðu skjølunum.

**Sørvágs Kommuna**
FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

**Sørvágs søga.**
Í 2015 kunnu vit hátíðarhalda rundan dag, tí tá hevur Sørvágs kommuna 100 ár á baki sum sjálvstøðug kommuna.
Hvat savnaða tilfarið kann nýtast til, setir bert hugflogið mark fyri.
Nágreinilig og álitandi søguskriving er ein møguleiki, men vit kunnu í øllum førum fegnast um, at tilfarið er varðveitt, tí var tilfarið ikki kannað og gjøgnumgingið nú, var stórur vandi fyri, at nógv av tí var farið fyri skeytið.
Arbeiðið hjá Sonna Jacobsen er um at nærkast sínum enda. Avtala er gjørd fram til juni mánaða 2012, og tá skuldi yvirlit um húsabygging, nær fremmandafólk og sørvingar, eru komin og farin úr bygdini, verið tøkt.

**Sjólátnir sørvingar**
Fyrst í árinum bað undirritaði Sonna Jacobsen finna fram til nøvnini á teimun sørvingum, sum vóru deyðir á sjónum. Har sum * stendur, er árstalið ikki nágreiniliga prógvað, men er sambært frásøgn. Um onkur hevur nærri upplýsingar ella veit um persón/persónar, sum mangla á listanum, vilja vit fegin frætta.

## Gomlustovubáturin

**6. mai 1841.** 8-mannafar gekk burtur á veg vestur av handilsørindum í Vestmanna. 8 mans sjólótust.

- Rasmus Jacobsen, uppi í Lofti, f. 1792, formaður.
- Jákup Joensen, Mýran, f. 1796.
- Jóhan Erik Joensen, hjá Jóhan Eiriki, f. 18.5.1802.
- Jóhan Clementsen, Lambastovan, f. 3.3.1811.
- Óli Danielsen, Ólavsstova, f. 1811.
- Ísak Johannesen, húskallur, ættaður úr Mykinesi, f. 9.5.1822.
- Hans Niklái Poulsen, hjá Póli (Pollastova), f. 27.10.1824.
- Frederik Johannesen, úti í Stovu, ættaður úr Miðvági, f. 16.5.1823.

- **1850*** Heini Joensen, Nýggjustova, f. 29.9.1824. Sjólátin við donskum skipi í útisigling.

## Nýggjustovubáturin

**17. mars 1875.** 8-mannafar, gekk burtur út fyri Presttanga á veg inn á Miðvág fyri veður.
5 menn bjargaðust og 3 sjólótust.

- Óli Olsen, norðri í Húsi, f. 1815.
- Niklái Mouritsen, hjá Mórusi, f. 10.11.1851.
- Heini Joensen, Nýggjustova, f. 4.8.1857.

## 4-mannafar

**7. mars 1883.** 4-mannafar. Gekk burtur úti á Vík. 2 menn bjargaðust og 2 sjólótust.

- Jákup Christoffersen, hjá Stoffa, f. 17.10.1848.
- Dávur Guttesen, húskallur, ættaður úr Vestmanna, f. 19.1.1865.

FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

## Norðristovubáturin

**22. mars 1888.** 8-mannafar, gekk burtur í Dragasundi av norðanbrimi. 8 mans sjólótust.
- Heini Niclasen, norðri í Stovu, formaður, f. 15.10.1844.
- Sámal Olsen, inni í Stórustovu, f. 8.4.1851.
- Niclas Hansen, á Dunga, f. 24.11.1856.
- Rasmus Hansen, hjá Hans uppi í Lofti, f. 23.2.1857.
- Hans Nikláí Mortensen, hjá Mortani (Pollastova), f. 21.7.1865.
- Jóan Pauli Haraldsen, hjá Haraldi, f. 22.9.1865.
- Jóhannes Bernhard Thomassen, Kelduni, f. 10.6.1865.
- Tummas Zacharias Hansen, á Dunga, f. 15.2.1868.

- **1895.** Kristian Davidsen, fyrri maður Dáva Jóhannu, f. 8.9.1864. Sjólátin á útróðri í Íslandi.

## Lenubáturin

**12. februar 1900.** Gekk burtur á útróðri, 6 mans sjólótust.
- Sámal Hansen, norðri í Beiti, f. 21.2.1852.
- Pætur Petersen, Gretustova, f. 2.1.1852.
- Poul Hansen, norðri við Gil, f. 16.2.1878.
- Hans Frederik Hansen, Gretustova, f. 24.8.1877.
- Jóan Pauli Hansen, Gretustova, f. 13.3.1882.
- Jóan Hans Joensen, húskallur úti í Stovu, Mykinesi, f. 1.7.1879.

- **1910*** Niels Jákup Davidsen, á Kelduni, f. 10.4.1885. Hann datt fyri borð á báti á veg úr Havnini til Sørvágs.
- **1918*** Elias Hansen, á Dunga, f. 9.4.1873. Gekk burtur undir Íslandi við íslendskum útróðrarbáti.
- **1918.** Óli Jákup Olsen, inni í Stórustovu, f. 5.5.1880. Doyði av spreinging umborð á trolara í Halifax.
- **27.2.1920.** Anton Henriksen, úti í Stovu, f. 27.9.1889, gekk burtur við "Helenu".
- **10.3.1921.** Ólavur Jacobsen, uppi í Lofti, f.6.5.1892. Doyði í Keypmannahavn. Málaði uttanborða á "Tjaldrinum" hjá D.F.D.S., sum hann sigldi við, datt niðurímillum og doyði.
- **24.4.1922.** Sámal Hansen, hjá Hans Marius við Gil, f. 9.8.1901. Druknaði á útróðri frá Skaula í Íslandi.
- **1922*** Martin Olsen, inni í Stórustovu, f. 23.3.1902. Slerdi út við slupp á heimveg undan Íslandi.
- **11.4.1932.** Tummas Mouritsen, hjá Jens Hendriki, f. 7.9.1910. Gekk burtur við "Lauru".
- **11.4.1932.** Jóhan Jensen, hjá Milju, f. 11.11.1901. Gekk burtur við "Lauru".
- **21.5.1933.** Andrias Thomasen, hjá Tummasi, f. 8.9.1884. Doyði umborð á "Capellu" til fiskiskap undir Íslandi.
- **August 1937.** Sámal Weihe, hjá Livu, f. 19.2.1882. Doyði undir Íslandi við "Seagull og er grivin á Siglifjørðinum.
- **22.5.1939.** Karl Olsen, uppi í Beiti, f. 1923. Gekk burtur við Dalsfles við sandbátinum "Sally" hjá N.C. Monberg, sum arbeiddu við havnargerð í Sørvági.

FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

- **1940*** Herluf Jacobsen, á Kelduni, f. 1920. Druknaði í dokkini í Aberdeen.
- **1947*** Sigurd Davidsen, á Stakka, f. 1919. Sigldi úti, slerdi út frá einum skjótgangandi báti í Durban. Er grivin í Durban.
- **23.1.1952.** Erling Løvendahl Rasmussen, f. 26.2.1915. Druknaði við keiina í Sørvági.
- **2.8.1956.** Óli Weihe, sonur Jóhan Weihe, f. 24.7.1950. Druknaði við keiina í Sørvági.
- **17.12.1957.** Ernst Simonsen, hjá Mikkjal hjá Mórusi, f. 1916. Slerdi út norðanfyri Mykines við línubátinum "Rógvukollur".
- **14.9.1963.** Torgrim Davidsen, f. 7.9.1935. Druknaði í Grønlandi, tá bátur teirra sakk.
- **Á páskum 1967.** Jonleif Hansen, hjá Valdinu, f. 23.1.1943. Var ein av fýra, sum sjólótust í gummibáti frá "Nólsoyar Páll", sum hevði fingið ein sjógv.
- **1.6.1969.** Jóhannus Niclasen, hjá Óla á Bø, f. 9.10.1913. Datt á sjógv við støðna í Mykinesi og druknaði.
- **21.6.1969.** Hermod Gásadal, hjá Gásadals Martin, f. 1.7.1929. Druknaði í dokk í Onglandi, har skip teirra lá.
- **28.8.1973.** Andrias Jacobsen, hjá Jesari, 12.11.1933. Doyði umborð á "Royndini" til fiskarí undir Íslandi.
- **30.10.1971.** Olivar Gaasedal, hjá Gásadals Martin, f. 20.09.1937. Fórst við Jette Kristine, E 424, ein av teimum fyrstu stálkuttarunum í Esbjerg. Hildið verður, at hann var farin út á dekkið í ringum veðri og fór fyri borð, tá skipið fekk eitt brot.
- **11.4.1980.** Torkil Thomassen, hjá Olivari, f. 15.10.1938. Slerdi út við fiskibáti sínum í fiskiskapi út frá Esbjerg.
- **7.12.1984.** Per Olsen, hjá Juda, f. 15.11.1958. Gekk burtur við ídnaðarskipi í Norðsjónum.
- **6.2.1985.** Harry Jacobsen, f.22.8.1933. Druknaði við keiina í Sørvági.

At enda fari eg at taka tvey skjøl úr rúgvuni um Sørvágs havn.
Tað fyrra er um motorbátarnar, og teir gjalda bert teymagjald. Okkara Selvík, sum nú er eitt slag av vartekin fyri bygdina, hevur bert goldið 10 kr. Hví, veit eg ikki, men hinir, sum hava goldið 12 kr. eru allir um somu støðd, tað sum kallað var motorbátar.

| **Fast gjald fyri 1941** | | | |
|---|---|---|---|
| **Navn** | **Heimstaður** | **Dagar** | **Teymagjald** |
| m/b Tre Brødre | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/b Lundin | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/b Sílið | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/b Oyama | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/b Skandia | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/b Bosin | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/b Líðarfossur | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/b Drangur | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/b Servin | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/b Selvík | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 10 kr. |
| m/b Hamraberg | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/b Títtlingur | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/b Erling | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |

FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| m/b Togo | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/b Uranus | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/b Ito | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/b Sanna | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 12 kr. |
| m/s Skarpheðinn | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 48 kr. |
| m/s Haffarið | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 48 kr. |
| m/s Eysturoyggin | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 48 kr. |
| m/s Thor | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 48 kr. |
| s/t Vesturvarði | Sørvág | 1/1 - 31/12 1941 | 48 kr. |

Í niðaru talvini eru havnargjøld og brúgvagjøld. Tann fyrsta lítla atløgubryggjan, sum tikin varð í brúk síðst í 1939, hevur vitjan úr stóru verð, sæst í yvirlitinum.

| **Apríl 1940** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Navn** | **Heimstaður** | **Dagar** | **Havnagjald** | **Brúgvagjald** | **Annað** |
| s/s Smiril | Tórshavn | 05-apr | | 9,38 | Vøra |
| s/s Ocean Princess | Aberdeen | 18-apr | 8,40 | 6,60 | |
| m/s Sólaris | Sandavág | 19-apr | 14,40 | 21,60 | |
| s/s Feru Bank | Aberdeen | 20-apr | 4,00 | 6,00 | |
| s/s Craig Castilach | Aberdeen | 25-apr | 6,00 | 9,00 | |
| s/s Childan | Aberdeen | 25-apr | 6,00 | 9,00 | |
| s/s Kinaldia | Aberdeen | 30-apr | 6,00 | 9,00 | |
| s/s Rókur | Tórshavn | 30-apr | | 3,75 | Vøra |
| | | | | | |
| **Mai 1940** | | | | | |
| **Navn** | **Heimstaður** | **Dagar** | **Havnagjald** | **Brúgvagjald** | **Annað** |
| s/s Smiril | Tórshavn | 10-maj | | 9,38 | Vøra |
| m/k Ruth | Fuglafjørð | 12-maj | 5,30 | 7,95 | |
| Árnanes | Fuglafjørð | 17-maj | | | 31 1/2 t. ísfiskur. 47,25 kr. vørugjald |
| s/t Ben Churn | | 17-maj | 5,00 | 10,00 | |
| Vesturfarði | Vestmanna | 19-maj | 9,50 | 14,25 | |
| s/t Agu H. Hostie | Aberdeen | 19-maj | 5,00 | 10,00 | |
| Kvik | Klaksvík | 24-maj | 1,50 | 3,25 | |
| Árnanes | Fuglafjørð | 29-maj | | | 14 t. ísfisk. 21 kr. vørugjald |

**Vinnulívið**

Í síðsta kunningarskrivi var Fiskavirking farið av knóranum, og frá hesum stað vóru vit bangin fyri, at minni eftirspurningur fór at geva minni prís. Men lukkutíð hendi tað ikki. Tað gleðiliga er nú hent, at millum manna er bjartskygni aftur at hóma. Boðað verður frá, at fleiri virki fara at lata upp aftur, og vónandi fara hesi at leggja seg eftir at gagnnýta alt okkara fiskiríkidømi.
Tann stóra nøgdin hjá trolaraflotanum undir Føroyum hevur verið upsi. Síðsta ár var fiskaríið eftir upsa stak vánaligt eftir gýtingina, og tað sama hendi aftur í ár.
Tó hevur fiskaríið hjá Vesturleika og Bresti verið á góðari leið. Makrelfiskaríið gav ikki tað stóra í peningi, men tað gav nakað í vitan, og verður høvi at fiska makrel í komandi árum, so er manningin betri ílatin til hetta fiskaríið eftir at hava havt eitt royndarár.
Nøgdirnar av føroyagrunninum, ið farnar eru um bryggjukantin hjá Sørvágs havn, eru í 2011 minkaðar nakað í mun til síðsta ár.
Landingarmiðstøðin tók ímóti 3.800 tonsum í 2007, 5.000 tonsum í 2008, 7.000 tonsum í 2009, 9.000 tonsum 2010 og í skrivandi løtu eru 7.500 tons farin um bryggjukantin í 2011.
Orsøkin til at landingarmiðstøðin hevur tikið ímóti minni nøgdum í ár, er at hóast talið av skipum hevur verið tað sama, sum undanfarin ár, so hava nøgdirnar, serliga av upsa, verið nógv minni.




**Hiddenfjord (Luna)**

Meðan nøgdin av fiski av føroyagrunninum er lakari í ár enn í fjør, er tøkan av laksi hjá Hiddenfjord í vøkstri.
Árið hjá virkinum hevur verið hendingaríkt. Framleiðslan er nógv vaksin, og munandi fleiri arbeiðsdagar hava verið á kryvjivirkinum samanborið við 2010.
Nøgdirnar og arbeiðsdagarnir á virkinum hava verið vaksandi seinastu árini. Í 2010 vóru 5.000 tons tikin. Tá liðugt er at kryvja í ár, hava tey kruvt 7.700 tons, og gongur sum ætlað, so verða millum 10.000 – 11.000 tons kruvd í 2012.
Trongligt verður væntandi á bryggjuni í 2012. Longu millum jól og nýggjár verða tøkubúrini løgd við bryggjukantin, og so verður kruvt úr ringunum á Sørvágsfirði væntandi 7.000 tons fram til september mánaða, tá blóðgiútgerðin verður flutt til Gøtu.
Rokaligt hevur verið rundan um virkið síðstu mánaðirnar. Umframt kryvjiarbeiði hevur kommunan umlagt kloakkskipanina á bryggjuni, og virkið hevur umbygt kantinu og skrivstovupartin. Hetta arbeiði er um at verða liðugt.

**Á fjørðinum**

Hiddenfjord hevur havt síni aliloyvi á norðursíðuni á fjørðinum út móti Stórá í Bø og í Selvíkini. Ætlanin er at niðurleggja alingina á norðaru síðu, samstundis sum royndarøkið vestan fyri Múlan verður lagt aftrat økinum í Selvíkum.

**Atlantic Airways**

Føroyska flogfelagið húsast eisini í okkara kommunu. Teirra virksemi avspeglast eisini í inntøkunum hjá kommunum í Vágum.
Samlaða framleiðsla felagsins er økt 11% fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í 2011 í mun til tíðarskeiðið í fjør. Vøksturin í framleiðsluni stavar frá leiguflúgving við flogførum uttanlanda.
Rutuflutningurin stendur fyri 81% av framleiðsluni, meðan leiguflúgving við flogførum stendur fyri 12% og tyrluflúgving 6%.
Ferðafólkatalið á rutunetinum er økt 4% úr 147.976 ferðafólkum upp í 154.044 ferðafólk fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í 2011 í mun til sama tíðarskeið í fjør. Broytingin stavar í stóran mun frá ávirkanini, ið eldgosið í Íslandi hevði á flogferðsluna í fjør.
Fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í 2011 hevði Atlantic Airways 27 mió. kr. í avlopi fyri skatt, ið er 17 mió. kr. hægri enn sama tíðarskeið í fjør.
Í mars 2012 fær felagið nýtt Airbus A 319 flogfar, ið tekur 144 ferðafólk.
Sum fyrsta flogfelag í Europa fer Atlantic Airways at innføra RNP-ARO.1 navigatión í samband við nýggja flogfarið. Felagið væntar, at nýggja mannagongdin fer at bøta um reglusemi og spara brennievni.

**Almennir pengar.**

Kunningarskrivið er í høvuðsheitum um tað, ið fólkið í kommununi fær fyri skattakrónurnar. Eisini verður nortið við vinnulívið og annað ítriv í kommununi.
Sitandi bygdaráð hevur roynt at fingið nakrar krónur av landsins fíggjarlóg, men har hevur lítið, fyri ikki at siga einki, verið at heinta.
Treyðugt so. Mykines hevur fingið nakrar krónur av rakstrarstaðnum á fíggjarlóguni, sum eitur " stuðul til infrakervið á útoyggj". Fyri komandi ár hava vit søkt um góðar 700.000 til ábøtur á vegir, tøming av bátahyli v.m.
Onkur heldur, at nú ert tú órímuligur, tí hvat við terminali og flogvølli. Tað kemur ikki ein króna til flogvøll ella terminal úr landskassanum. So stutt er tann søgan.
Á fíggjarætlanini hjá løgtinginum er ein konto, ið kallast "Trygdartiltøk, størri ábøtur og umvælingar". Upphæddin er í uppskotinum 5.7 mió. kr, sum er til alt landið.
Vit hava við tógvið stríð fingið eina ætlan frá Landsverk um landsvegin frá flogvøllinum, oman eftir Traðarbrekku, út eftir Skúlavegnum til íbingingina í Stangavegin. Traðarbrekka er øll sum hon er landsvegur.
Ætlanin er at gongubreyt skal gerast í høgru síðu, sum er 2 metrar breið og vegbreiddin er 6 metrar. Ein byrjan varð gjørd niðri á Blindtarminum, men so kom stígur í. Vit fara framhaldandi at royna at fáa gongd á arbeiðið aftur.




FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

**Fundir v.m.**
Bygdaráðið hevur havt 14 bygdaráðsfundir í 2011. Íalt 125 mál hava verið til viðgerðar.
Bygdaráðið hevur ásett førstu bygdaráðsfundirnar fyri 2012. Fundirnir verða kl. 18 í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni niðanfyri nevndu dagar:

Mikukvøldið 25. januar
Hóskvøldið 23. februar
Hóskvøldið 29. mars
Mikukvøldið 25. apríl
Mikukvøldið 31. mai
Mikukvøldið 27. juni
Mikukvøldið 05. september
Mikukvøldið 26. september
Mikukvøldið 31. oktober
Mikukvøldið 07. november
Mikukvøldið 28. november
Mikukvøldið 05. desember
Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi 14 dagar fyri fundin.
Eykafundir ella broytingar til omanfyri nevndu, verða lýstir í svørtutalvu á kommunuskrivstovuni.

**At enda**
Árið 2011 lækkar móti endanum, og vit hava litið aftur á tað, sum farið er, samstundis sum vit líta fram eftir tí, vit vóna hendir í komandi ári.
At enda fari eg bygdaráðsins vegna at ynskja øllum eitt gott nýggjár.

Sørvágur, 16. desember 2011

Vinaliga

Sørvágs kommuna

Sune, Jacobsen, borgarstjóri

# Sørvágs kommuna

# Yvirlit

## Høvuðsyvirlit

**Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan**

| | | Rakstrarætlan | | 2012 |
|---|---|---|---|---|
| Túsund kr. | | Útreiðslur | Inntøkur | Løgu-ætlan |
| **§ 1.** | **Kommunal fyrisiting** | **3.159** | - | - |
| | 11. Felagsútreiðslur | 3.159 | - | - |
| **§ 2.** | **Almanna- og heilsumál** | **2.608** | - | - |
| | 20. Heilsumál | 1.103 | - | - |
| | 21. Almannamál | 1.505 | - | - |
| **§ 3.** | **Børn og ung** | **6.595** | - | **250** |
| | 26. Barnaansing | 6.595 | - | 250 |
| **§ 4.** | **Undirvísing** | **3.654** | - | **5.730** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 3.654 | - | 5.730 |
| **§ 5.** | **Mentan og frítíð** | **1.707** | - | **2.400** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 365 | - | - |
| | 24. Mentan | 1.342 | - | 2.400 |
| **§ 6.** | **Teknisk mál** | **4.682** | - | **2.839** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 995 | - | 606 |
| | 24. Mentan | 316 | - | - |
| | 30. Umhvørvi | 901 | - | 303 |
| | 38. Samferðsla og samskifti | 2.471 | - | 1.930 |
| **§ 7.** | **Kommunal virki** | **2.553** | - | **300** |
| | 30. Umhvørvi | 1.982 | - | - |
| | 31. Tilbúgving | 371 | - | - |
| | 38. Samferðsla og samskifti | 200 | - | 300 |
| **Tilsamans** | | **24.959** | - | **11.519** |
| § 20. | 22. Íbúðarmál | 1.000 | - | - |
| § 20. | 50. Rentur | 1.159 | 280 | - |
| § 20. | 52. Skattir og avgjøld | - | 31.100 | - |
| Tilsamans | | 27.118 | 31.380 | 11.519 |
| Yvirskot | | - | 4.262 | - |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | | - | **-7.257** | - |
| § 25. | 62. Afturgjald av skuld | 1.143 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | | **1.143** | **-7.257** | **-8.400** |
| Fígging: | | | | |
| § 25. | 64. Útvegan av gjaldføri | 0 | 8.400 | - |
| Fígging íalt: | | 0 | 8.400 | 8.400 |
| **Samanlagt** | | **1.143** | **1.143** | - |

# Høvuðsyvirlit yvir játtanarroknskapin fyri 2010

| | Játtan | | | Roknskapur | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Rakstur og útlán | | | Rakstur og útlán | | |
| Túsund kr. | Útreiðslur | Inntøkur | Løgur | Útreiðslur | Inntøkur | Løgur |
| **§ 1. Kommunal fyrisiting** | **3.044** | - | **50** | **3.152** | - | **0** |
| 11. Felagsútreiðslur | 3.044 | - | 50 | 3.152 | - | - |
| **§ 2. Almanna- og heilsumál** | **2.553** | - | **130** | **2.616** | - | **0** |
| 20. Heilsumál | 1.044 | - | 130 | 917 | - | - |
| 21. Almannamál | 1.509 | - | - | 1.699 | - | - |
| **§ 3. Børn og ung** | **5.923** | - | **4** | **6.157** | - | **1** |
| 26. Barnaansing | 5.923 | - | 4 | 6.157 | - | 1 |
| **§ 4. Undirvísing** | **3.379** | - | **600** | **3.506** | - | **1.947** |
| 23. Útbúgving og gransking | 3.379 | - | 600 | 3.506 | - | 1.947 |
| **§ 5. Mentan og frítíð** | **1.690** | - | **6.468** | **1.710** | - | **5.188** |
| 23. Útbúgving og gransking | 435 | - | 4.968 | 344 | - | 5.188 |
| 24. Mentan | 1.255 | - | 1.500 | 1.367 | - | 0 |
| **§ 6. Teknisk mál** | **5.169** | - | **3.659** | **5.886** | - | **4.064** |
| 11. Felagsútreiðslur | 640 | - | 1.169 | 893 | - | 1.299 |
| 22. Íbúðarmál | - | - | 1.790 | - | - | 2.084 |
| 24. Mentan | 98 | - | - | 92 | - | - |
| 30. Umhvørvi | 725 | - | 500 | 777 | - | 457 |
| 37. Handil og vinna annars | - | - | 0 | - | - | 0 |
| 38. Samferðsla og samskifti | 3.706 | - | 200 | 4.124 | - | 224 |
| **§ 7. Kommunal virki** | **2.026** | - | **700** | **2.433** | - | **810** |
| 30. Umhvørvi | 1.843 | - | - | 2.024 | - | - |
| 31. Tilbúgving | 353 | - | - | 337 | - | - |
| 38. Samferðsla og samskifti | -170 | - | 700 | 73 | - | 810 |
| **Tilsamans** | **23.784** | - | **11.611** | **25.461** | - | **12.010** |
| § 20. 22. Íbúðarmál | 1.000 | - | - | 994 | - | - |
| § 20. 35. Sjóvinna | - | - | - | 0 | - | - |
| § 20. 50. Rentur | 718 | 260 | - | 644 | 254 | - |
| § 20. 52. Skattir og avgjøld | - | 30.850 | - | - | 31.283 | - |
| Tilsamans | 25.502 | 31.110 | 11.611 | 27.098 | 31.537 | 12.010 |
| Yvirskot | - | 5.608 | - | - | 4.439 | - |
| | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Yvirskot** | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Yvirskot** |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | - | **-6.003** | - | - | **-7.571** | - |
| § 25. 60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m." | - | 503 | - | - | 1.981 | - |
| **Nettokassaúrslit** | - | **-5.500** | **-5.500** | - | **-5.590** | **-5.590** |
| § 25. 62. Afturgjald av skuld | 0 | - | - | 315 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | - | **-5.500** | **-5.500** | **315** | **-5.590** | **-5.905** |
| Fígging: | | | | | | |
| § 25. 64. Útvegan av gjaldføri | 0 | 5.500 | - | 0 | 5.905 | - |
| Fígging íalt: | 0 | 5.500 | 5.500 | 0 | 5.905 | 5.905 |
| **Samanlagt** | - | - | - | **315** | **315** | - |